

## Lestrarstarv

Frá 1992 í í Bikuben Børs. Talan var bæði um fulltíðar starv, og lestur. Starvið fór við so nógvari tíð, at lesturin gjørdist meir eitt ítriv at kalla. Áðrenn tað forvann eg manga góða krónu á Havsbrún í ferium.



## Slips: Óteljandi mong



*Peter metir, at 1992-kreppan alt ov ofta verður brúkt sum ræðslukampagna og undanførsla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

"Lesturin var meiri at kalla eitt ítriv" hesi árini sigur Peter smáflennandi. Men umfatandi arbeiðið við lánsbrøvum tendraði ein neista, sum seinni gjørdist ein logi. Heimafturkomin í 1995 gjørdist Peter deildarstjóri fyri fíggjardeildina hjá Føroya Banka. Í 2000 gjørdist Peter stjóri í Kaupthing Bank, og hevur hann ført bankan trygt og væl inn í 21. øld.

### Slapp væl undir kreppuni

Peter las niðri meðan búskaparkreppan var uppá tað ringasta í Føroyum. Á Bikuben Børs høvdu tey samskifti við onkur føroysk viðskiftafólk. Men annars sigur Peter, at persónliga merkti hann ikki nógv til kreppuna. Hann bleiv konfronteraður við henni, tá hann var heima í jólafrí- og summarfrí. "Eg skal viðganga – hóast tað kann tykjast løgið at siga so – at tað nívir meg eitt sindur, at eg ikki merkti kreppuna meir á egnum kroppi. Tað hevði givið mær ein førning, sum hevði bjálvað meg betri til verri tíðir."

Eitt forkunnugt sjónarmið, sum blaðmaðurin ikki hevur hoyrt fyrr. Peter er tó avgjørdir um, at 1992-kreppan alt ov ofta verður nýtt, sum ræðslukampagna og undanførsla. Ofta eisini, sum ein mental bremsa, at nú mugu vit í Føroyum høgga bremsurnar í, og ansa væl eftir o.s.fr.. Trupuleikin í føroyska samfelagnum er ikki, at tað gongur skjótt og væl við búskapinum, men at vit ikki greiða trupuleikarnar, sum føroyska samfelagið dragist við. Her nemur Petur við spurningin um útlendska arbeiðsmegi, sum sá út til at verða loystur til 1. januar 2008, men nú knappliga er alt blakað út í óvissuna aftur. Mangulin uppá útlendska arbeiðsmegi er skrìggjandi eftir Petersa tykki. Peter siterar inngangsrøðuna hjá Jóhan Páll Joensen á Vinnudegnum: "Hvat er serstakt fyri Føroyar? Jú vit drepa grind, vit hava seyð gangandi í brattastu skorum, og landsliðið tapir hvørja ferð. Og so snakka vit, uttan at handla!"

### Fyrimynd og ræðumynd

Sum stjóri í Kaupthing Bank hevur Peter sjálvsagt havt nógv samstarv við íslendingar. Eitt sum irreterar Peter er at hoyra uppá ávísar føroyskar og danskar røddir, sum endurtaka uppí saman: "At nú fer at ganga galið í Íslandi!". Peter er avgjørdur: "Hatta hava hasir svartsíggjarnir sagt líka síðan ár 2000. 7 ár eru farin, men higartil hevur tað gingið væl. Peter hoyrir dagliga nógv um íslendsku innrásina í Føroyum og annars um íslendsku útrásina frá fólki, sum hann møtir. "Tað løgna er, at tað mangan eru somu fólkini sum bæði hava Ísland sum fyrimynd og ræðumynd. Tey halda at íslendingar klára seg gott, at tað er flott at teir kunnu gera so nógvar íløgur, men at teir annars ikki skulu vísa seg her. Tað ljóðar sum ein andsøgn". Peter hevur ikki nakra meining um Ísland, sum politiska fyrimynd ella ræðumynd. Men tá tað kemur til tað vinnuliga, og tá tað kemur til altjóðageringina er Ísland ein fyrimynd fyri Peter. Teir hava fingið nógv ting í lag, sum føroyingar bara ganga og snakka um. Føroyskir politikarar seta onnur í gongd, í visjónsbólkum, uttan at gera nakað nevnivert sjálvir. Peter ætlar tó, at Kaupthing skal hava eina sterka støðu, bæði globalt og lokalt. Á Kaupthing ætla teir ikki at bíða eftir 2015!